# VÁGA KOMMUNA

# KOMMUNUSTÝRIS

# SKIPAN

# (2021)

**Kommunustýrisskipan**


| | |
|---|---|
| Býráðið | §§ 1-2 |
| Samsýningar | § 3 |
| Borgarstjórin | §§ 4-6 |
| Føstu nevndirnar | §§ 7-9 |
| Fíggjarnevndin | §§ 10-14 |
| Tekniska nevnd | § 15 |
| Vinnu- og Havnanevndin | § 16 |
| Mentanar- og Trivnaðarnevndin | § 17 |
| Yvirlit yvir ávísar nevndir | §§ 18-23 |
| Kunning, samstarv o.a. | §§ 24-26 |
| Onnur viðurskifti | §§ 27-29 |

## Kommunustýrisskipan

### Kapittul I
### Býráðið

**§ 1.** Býráðið í Vága kommunu hevur 11 limir, ið verða valdir eftir kommunalu vallógini, sbr. § 4, stk. 2 og 5, stk. 2, í kommunustýrislógini.

*Stk. 2.* Býráðið ásetir sínar reglur um málsmannagongd í eini fundarskipan, sbrt. § 5, stk. 3, í kommunustýrislógini.

*Stk. 3.* Býráðið ásetir nærri reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eini starvsfólkaskipan, sbrt. § 5, stk. 4, í kommunustýrislógini.

**§ 2.** Býráðið velur ein borgarstjóra, ið er settur við setanarbrøkinum 1/1, og ein varaborgarstjóra, sbrt. § 6 í kommunustýrislógini.

### Kapittul II
### Samsýningar

**§ 3.** Býráðslimir og onnur verða samsýnt eftir kunngerð nr. 93 frá 09. September 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini. Tá tað niðanfyri verður víst til ávísa grein í kunngerðini, er samsýningin sett til mest loyvdu upphædd sambært ásetingini.

1. Borgarstjórin — Sambært §10, stk. 2, nr. 4
2. Varaborgarstjórin — Sambært §11, stk. 2
3. Býráðslimir — Sambært § 3, stk.2, nr. 4
4. Nevndarformenn í føstu nevndunum — Sambært § 7, stk. 2, sbr. § 6, stk. 2, nr. 3
5. Nevndarlimir í føstu nevndunum — Sambært § 5, stk.1, sbr. § 6, stk. 2, nr. 3
6. Nevndarlimir í øðrum nevndum — Sambært § 2, stk. 2
7. Tiltakslimir — Sambært § 9
8. Samsýningar til onnur — Sambært § 9

*Stk. 2.* Borgarstjórin hevur eftirlønarskipan, ið er góðkend av býráðnum og lýkur ásetingarnar í § 13 í kunngerðini, nevnd í stk. 1.

*Stk. 3.* Borgarstjóri og býráðslimir fáa ikki frítíðaráskoyti/frítíðarløn.

### Kapittul III
### Borgarstjórin

**§ 4.** Nærri reglur um virksemi hjá borgarstjóranum í sambandi við Býráði verða ásettar í fundarskipan.

**§ 5.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini, sbrt. kapittul 4 í kommunustýrislógini.

*Stk. 2.* Á hvørjum vanligum fundi boðar borgarstjórin frá, hvørji mál eru koyrd í nevnd síðani seinasta fund.

*Stk. 3.* Borgarstjórin skal ansa eftir, at tey mál, ið krevja býráðsviðgerð, fáa tílíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin.

*Stk. 4.* Borgarstjórin skal síggja til, at málini verða avgreidd uttan óneyðuga seinking.
Borgarstjórin kann krevja allar upplýsingar um mál og málsavgreiðslu, ið eru hjá nevndum og starvsfólkum.

*Stk. 5.* Borgarstjórin ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum býráðsins, og at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan. Um borgarstjórin verður varugur við, at ein ætlan ella tiltak ikki hevur havt neyðuga játtan, verður málið at leggja fyri býráðið.

§ **6**. Hevur borgarstjórin forfall, yvirtekur varaborgarstjórin uppgávurnar í sambandi við fundarleiðsluna og aðrar uppgávur, í tann mun borgarstjórin ella í seinna enda býráðið áleggur honum.

## Kapittul IV
## Føstu nevndirnar

§ **7**. Til at taka sær av teirri beinleiðis fyrisitingini av viðurskiftum kommununnar verða hesar føstu nevndir skipaðar:

1. Fíggjarnevnd
2. Teknisk nevnd
3. Vinnu- og havnanevnd
4. Mentanar- og trivnaðarnevnd

*Stk. 2.* Í hvørjari av føstu nevndunum sita 5 býráðslimir.

§ **8**. Borgarstjórin kann kalla nevndarlimirnar í einari ella fleiri nevndum saman at tosa um felags áhugamál, sbrt. § 30, stk. 2, í kommunustýrislógini.

*Stk. 2.* Býráðið tekur avgerð um, hvussu møgulig træta verður loyst millum nevndirnar.

§ **9**. Nevndarformaðurin ansar eftir, at farið verður fram eftir nevndarsamtyktum, og at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan, sbrt. § 31, stk. 1, í kommunustýrislógini.

*Stk. 2.* Viðvíkjandi fíggjarætlan og eykajáttanum gera føstu nevndirnar, umvegis fíggjarnevndina, tilmæli til býráðið, sbr. § 38, stk. 4, í kommunustýrislógini.

### Fíggjarnevndin

§ **10**. Í fíggjarnevndini sita borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 4 aðrir býráðslimir.

*Stk. 2.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum viðurskiftum, ið eru løgd til hana sbrt. kap. 8 í kommunustýrislógini.

*Stk. 3.* Nevndin ger uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. kassa- og bókhaldsførsluskipan,
2. lántøku, veðsetan, rakstraravlop og tílíkt, og
3. eykajáttanir.

Ein frágreiðing frá nevndini skal fylgja við einum og hvørjum máli, ið viðvíkur kommunalum planleggingaruppgávum, tá málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

*Stk. 4.* Nevndin:

1. tekur sær av fíggjarligu planleggingini og samskipar kommunalu planleggingaruppgávurnar,
2. ger felags forskriftir fyri planleggingina og hjálpir hinum nevndunum við at útvega neyðugt grundarlag fyri teirra planleggingararbeiði, og
3. Ger metingar um fíggjarligu avleiðingarnar av teimum gjørdu planuppskotunum og ger tilmæli til býráðið.

*Stk. 5.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av:

1. keypi, sølu og veðseting av fastari ogn, og
2. starvsfólka- og arbeiðsviðurskiftum og líknandi málum.

**§ 11.** Fíggjarnevndin ger reglur fyri:

1. Skipanini av umsitingarliga eftirlitinum, sbr. § 12
2. Trygging av kommunalum ognum
3. Hvussu borgarstjórin og umsitingin fer fram í starvsfólkamálum
4. Samskipan av keypi

**§ 12.** Fíggjarnevndin hevur eftirlit við, at:

1. fíggjarognir verða umsitnar forsvarliga og í samsvari við avgerðir hjá býráðnum,
2. umsitingin av kommunukassanum og roknskaparføringin hjá kommununi er forsvarlig,
3. ikki verður farið út um játtanirnar á fíggjarætlanini uttan, at býráðið hevur samtykt hetta, og
4. skjalagoymslan hjá kommununi er forsvarlig

*Stk. 2.* Nærri reglur um umsitingina av kommunalu ognunum verða ásettar í einari bókhaldsførsluskipan, sbrt. § 38, stk. 3, nr. 1, í kommunustýrislógini.

**§ 13.** Fíggjarnevndin skal innan 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

*Stk. 2.* Við hvørja upphædd í uppskotinum skal verða viðmerkt:

1. tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár,
2. tann upphædd, ið er avsett fyri verandi fíggjarár, og
3. tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt í farna fíggjarári (roknskapur).

*Stk. 3.* Viðmerkingar skulu verða til hvørja konto, sum sigur undir hvørjum treytum, upphæddin kann brúkast, og hvør ið hevur ábyrgdina av kontoini.

*Stk. 4.* Tær íløgu- og fíggjarætlanir, ið nevndin hevur gjørt fyri egið øki, verða lagdar fram saman við uppskotinum til ársfíggjarætlanina.

*Stk. 5.* Listi yvir virðisbrøv og ogn hjá kommununi skal vera goymdur í bankaboks ella á líknandi tryggum stað.

**§ 14.** Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum, skal býráðið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi, krevst tó loyvi frá landsstýrismanninum, sbrt. § 46. stk. 2 í kommunustýrislógini.

**Tekniska nevnd**

**§ 15**. Tekniska nevnd hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

*Stk. 2*. Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja tekniska og umhvørvisliga økinum og lendisøkinum.

*Stk. 3*. Við útgangsstøði í byggisamtyktini tekur nevndin sær av:

1. Býar- og byggisamtyktum,
2. byggi- og bústaðarviðurskiftum,
3. umhvørvisvernd,
4. matvørulógini,
5. kollektivari samferðslu/undirsjóvartunnil,
6. renovatión,
7. vatnveiting,
8. áum,
9. vegum,
10. at samstarva við privatar og sjálvsognarstovnar á økinum hjá nevndini,

*Stk. 4* Í samstarvi við fíggjarnevndina, sbr. § 10, ger nevndin uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. íløguætlanir fyri økini, ið eru nevnd í stk. 2, og
2. gjøld fyri veitingarvirki.

*Stk. 5*. Nevndin tekur sær av rakstri og viðlíkahaldi av:

1. kommunalum virkjum og veitingarvirkjum,
2. frárensluverkum,
3. frítíðarøkjum,
4. kirkjugørðum, og
5. kommunalum bygningum og anleggum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd.

**Vinnu- og Havnanevndin**

**§ 16**. Vinnu- og havnanevndin hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

*Stk. 2*. Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja vinnu- og havnaøkinum.

*Stk. 3*. Vinnu- og havnanevndin tekur sær av:

1. vinnumálum.,
2. ferðavinnumálum, og
3. havnum.

*Stk. 4*. Í samstarvi við fíggjarnevndina, sbr. § 10, ger nevndin uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. íløguætlanir fyri økini, ið eru nevnd í stk. 3.

*Stk. 5*. Nevndin tekur sær av rakstri og viðlíkahaldi av:

1. havnaviðurskiftum.

**Mentanar- og trivnaðarnevndin**

**§ 17**. Mentanar- og trivnaðarnevndin hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

*Stk. 2.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja almanna- og heilsuøkinum.

*Stk. 3.* Mentanar- og trivnaðarnevndin tekur sær av:

1. Fólkaskúla og kvøldskúla,
2. bókasavnsviðurskiftum,
3. savnsviðurskiftum,
4. musikkskúlum og øðrum musikk tiltøkum,
5. ítróttar- og mentanarviðurskiftum,
6. uppgávum viðvíkjandi kommunalum ansingarstovnum og stovnum fyri eldri,
7. kirkjugørðum,
8. dagtilboðum til børn og frítíðarskúlan,
9. frítíðartiltøkum fyri børnum, ungum og gomlum,
10. sáttmálum, ið kommunan hevur við sjálvsognarstovnar og kommunal samstørv á økinum hjá nevndini,
11. útláni og útleigan av hølum í kommunalum bygningum til feløg v.m. á økinum hjá nevndini,

*Stk. 4.* Í samstarvi við fíggjarnevndina, sbr.§ 10, ger nevndin uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. Reglur fyri útláni og útleigu av hølum í kommunalum ognum á økinum hjá nevndini,
2. rakstrar- og viðlíkahaldsætlanir fyri bygningar á økjum hjá nevndini, og
3. íløguætlanir á økinum hjá nevndini.

**Kapittul V**
**Yvirlit yvir ávísar nevndir**

**Barnaverndarnevnd**

§ **18**. Barnaverndarnevndin verður sett eftir reglunum í § 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, við seinni broytingum.

*Stk. 2.* Limir og varalimir í barnaverndarnevndini fáa fundarsamsýning eftir § 2 í kunngerð nr. 93 frá 09. september 2014 um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni um barnavernd eru løgd undir kommununa, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**Tilbúgvingarnevnd**

§ **19**. Tilbúgvingarnevndin verður sett eftir reglunum í løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving.

Kommunan skal seta eina tilbúgvingarnevnd til fyrisiting av kommunalu tilbúgvingini.

*Stk. 2.* Í tilbúgvingarnevndini fyri Vága kommunu sita 5 limir: borgarstjórin, sum er formaður, formaðurin í teknisku nevnd,ein býráðslimur,einum limi tilnevndur av fútanum og tilbúgvingarleiðaranum, sum er fastur limur. Tekniski leiðarin er skrivari hjá Tilbúgvingarnevndini.

*Stk. 3.* Val av limum í tilbúgvingarnevndina fer fram aftaná hvørt býráðsval.

**Umhvørvisnevnd**

§ **20**. Umhvørvisnevnd verður vald fyri hvørja bygd sær og hevur 5 limir. Í nevndini verður valdur minst 1 kommunustýrislimur umboðandi Mentanar- og trivnaðarnevndina, sum er formaður.

*Stk. 2*. Umhvørvisnevndirnar eru hoyringspartur tá talan er um umhvørvisætlanir í kommununi, og í málum, ið mett verða at hava ávirkan á umhvørvið í bygdunum. Nevndirnar kunnu gera uppskot og broytingar til umhvørvisætlan.

**Bygdasavn**

§ **21**. Í Bygdasavnsnevndina í Sandavági eru vald umboð fyri fornminnafelagið og býráðið, sbrt. viðtøkunum fyri Bygdasavnið, ið eru góðkendar av Mentamálaráðnum, sbrt. løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi við seinni broytingum.

*Stk. 2*. Nevndin tekur sær av uppgávunum, ið viðvíkja fornminnum, søvnum og søguligum viðurskiftum v.m.

Stk. 3. Bygdasavnið í Miðvági er sambært viðtøkunum skipað sum kommunalur stovnur, ið verður stjórnaður av býráðnum.

**Heimatænastan í Vágum**

Er sett eftir reglum í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

§ **22**. Býráðið velur limir í stýrið í Heimatænastuni í Vágum, eftir samstarvsavtaluni millum Vága kommunu og Sørvágs kommunu.

**Skúlastýrið**

§ **23**. Eftir reglunum í fólkaskúlalógini velur býráðið 2 limir og 2 varalimir í skúlastýrið fyri Skúlan á Giljanesi.

**Kapittul VI**
**Kunning, samstarv o.a.**

**Nærdemokrati**

§ **24**. Fyri at tryggja øllum borgarum í kommununi samband við kommunala myndugleikan og størst møguliga kunning og ávirkan á egin viðurskifti, verður miðað móti at skipa fyri kunnandi fundum og almennum hoyringum í sambandi við viðgerð av málum, ið mugu metast at hava serligan týdning ella áhuga fyri borgararnar, ávísar borgarar ella borgarar í ávísum øki í kommununi.

*Stk. 2*. Tey mál, sum verða løgd fyri almenningin eftir reglunum í stk. 1, eru m.a. um:

1. Broyting í býarskipanini og/ella byggisamtyktini, sum umframt lógarfestu mannagongdina um framløgu v.m., eisini verða løgd fyri borgararnar, áðrenn málið verður viðgjørt og samtykt av býráðnum.
2. Størri verkætlanir av ymiskum slagi

**Kommunalt samstarv**

§ **25**. Miðast skal ímóti, at bygdir í samstarvsøkinum við yvir 350 íbúgvum verða umboðaðar við einum limi og tiltakslimi fyri hvørja bygd.

**§ 26**. Vága kommuna hevur samstarvssáttmála um ella við:

1. Barnavernd við kommunurnar í Sørvágs kommunu,
2. Heilsudepilin í Vágum við Sørvágs kommunu,
3. Musikkskúlan í Vágum við Sørvágs kommunu,
4. Barnaverndarstovu Føroya,
5. Kommunufelag Føroya,
6. Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF),
7. Sørvágs kommunu um mál av felags áhuga.
8. SEV,
9. IRF,
10. Líkkoyring við Sørvágs, Vestmanna og Kvívíkar kommunur, og
11. Visit Vágar við Sørvágs kommunu

**Kapittul VII**
**Onnur viðurskifti**

**§ 27**. Býráðslimur kann skrivliga heita á borgarstjóran um at fáa upplýsingar og tekniska hjálp í sambandi við fyrireiking til fundir, sbr. § 16 í kommunustýrislógini.

*Stk. 2*. Borgarstjórin ansar eftir, at allir kommunustýrislimir á hóskandi hátt fáa somu upplýsingar, ið eru fingnir tilvega sambært stk.1.

**§ 28**. Beinleiðis atgongd til skjalagoymsluna er avmarkað til borgarstjóran, kommunustjóran, skrivaran, journalføraran, fíggjarleiðaran og tekniska leiðaran.

*Stk. 2*. Borgarstjórin setir nærri reglur um mannagongdir viðvíkjandi journalskipanini samsvarandi mannagongdunum og leiðbeining frá Landsskjalasavninum.

*Stk. 3*. Borgarstjórin ásetir nærri reglur um KT- trygd, soleiðis at viðgerðin av persónsupplýsingum í kommununi til eina og hvørja tíð er í samsvari við løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum og tilhoyrandi kunngerðir.

**Kapittul VIII**
**Broytingar í kommunustýrisskipanini**

**§ 29**. Uppskot til broytingar og uppískoyti í hesar viðtøkur skulu verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum og skulu í minsta lagi vera 14 dagar ímillum hvønn fundin.

Samtykt á býráðsfundi í Vága kommunu,

tann 25/05/2021

Bjarni Prior, borgarstjóri